## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í skrið og regn. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og leygarkvøldið eitt skifti regn, annars turt og sólglottar. Hitin millum 12 og 16 stig.

# Countrysangari hevur skrivað sang um Føroyar

**Woody Wright hevur brúkt føroyska dansin sum inspirasjón til sín sang um Føroyar. Sangurin varð stórliga fagnaður á Fjarðafestivalinum**



TÓNLEIKUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Tað er als ikki vanligt, at ein kann hoyra ein amerikanskan countrysang við einari rútmu, sum er inspirerað av tí føroyska dansinum. Men nú finst loksins ein sangur, sum eitur "Dance Faroe dance". Sangurin er skrivaður av amerikanska countrygospel-sangaranum, Woody Wright, sum seinast í august mánaði sang á Fjarðafestivalinum í Skálabotni. Woody Wright hevði føroyska flaggið við upp á pallin, tá hann frumframførdi sangin í Føroyum, og vóru føroysku áhoyrarnir sera bergtiknir av hesum serliga sanginum.

### Lisið uppá

Eitt annað, sum ger sangin undrunnarverdan er, at hann er skrivaður, áðrenn Woody Wright setti fótin á føroyska jørð á fyrsta sinni. Tá tað varð greitt, at Woody skuldi syngja á Fjarðafestivalinum fór hann at lesa upp á Føroyar. Ikki bara um náttúruna og ta samfelagsligu søguna hjá Føroyum. Woody gjørdist eisini hugtikin av átrúnaðarligu søguni hjá Føroyum. Hann sá eisini eitt ljóð- og myndabrot av tí føroyska dansinum á internetinum, og varð botnurin til sangin lagdur tá. – Tað vóru jú eingi trø í Føroyum, so fólk kundu jú ikki gera nøkur ljóðføri, so tað gjørdist jú fótarútman – stevið – sum gjørdist ljóðføri føroyinga.

Hetta gav Woody Wright til kennar á Rás2. Skemtandi sigur Woody, at sangurin ikki kann sammetast við føroysku kvæðini í longd.

– Sangurin hjá mær hevur ikki eingong 200 orð.

### Ynskir at koma aftur

Woody brúkar vanliga ein dag um at skriva ein sang, byrjar tað at taka ov langa tíð at skriva ein sang, so plagar hann sum oftast at kasta sangin frá sær. Hann hevur ikki bara skrivað ein sang um Føroyar. Áðrenn hann kom til Føroya, vitjaði Woody í Noregi, og skrivaði hann eisini ein sang um Noreg. Og júst í hesum døgum hevur Woody vitjan av norskum vinfólkum.

– Eg royni at skriva ein sang til tey londini, sum eg vitji, og sjálvsagt skuldu Føroyar eisini hava ein sang.

Woody fegnast um, at sangurin varð so væl móttikin av áhoyrarunum á Fjarðafestivalinum, og at summi enntá gávu so stóran respons, at tey slóu ring, meðan hann framførdi "Dance Faroe dance" á pallinum.

Sangurin er nú í tónleikasavninum hjá Rás2, og man tað verða púra víst, at hann fer at verða nógv ynskt á "Ynskiløtuni" komandi dagarnar. Woody er glaður um teir nýggju vinirnar, hann og konan, Peggy hava fingið her í Føroyum, og vónar hann, at hann skjótt kann verða aftur á klettunum og syngja sín Føroyasang fyri føroyingum.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 15 |
| Aberdeen | 19 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 19 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 30 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 27 |
| Athen | -- |
| Malta | 33 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 16 |
| New York | 27 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 29 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 986 hPa. við New Foundland – ex » ódnin IKE«, fer móti Íslandi og dýpist.



**Í dag:**
Djúpa lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikukvøldið.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/08 kl. 06⁰⁰ – 10/09 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,4°
Minsti hiti máldur í september: 0,4° - Mesti hiti máldur í september: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 09/08 kl. 06⁰⁰ – 10/09 06⁰⁰.
Avfallið higartil í september: 43 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

7. september Fyrra kvarter
Mánin longst frá jørðini
15. september Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 16. sept | 7:49 | 20:10 | 6:49 | 19:10 | 7:04 | 19:25 | 9:49 | 22:10 | 10:49 | 23:10 | 6:04 | 18:25 | 5:04 | 17:25 | 8:04 | 20:25 | 9:04 | 21:25 | 7:34 | 19:55 | 8:49 | 21:10 |
| 17. sept | 8:31 | 20:53 | 7:31 | 19:53 | 7:46 | 20:08 | 10:31 | 22:53 | 11:31 | 23:53 | 6:46 | 19:08 | 5:46 | 18:08 | 8:46 | 21:08 | 9:46 | 22:08 | 8:16 | 20:38 | 9:31 | 21:53 |
| 18. sept | 9:15 | 21:40 | 8:15 | 20:40 | 8:30 | 20:55 | 11:15 | 23:40 | - | 12:15 | 7:30 | 19:55 | 6:30 | 18:55 | 9:30 | 21:55 | 10:30 | 22:55 | 9:00 | 21:25 | 10:15 | 22:40 |
| 19. sept | 10:05 | 22:32 | 9:05 | 21:32 | 9:20 | 21:47 | - | 12:05 | 0:40 | 13:05 | 8:20 | 20:47 | 7:20 | 19:47 | 10:20 | 22:47 | 11:20 | 23:47 | 9:50 | 22:17 | 11:05 | 23:32 |

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

Alt um harmonikur



www.simme.eu

Lesið Sosialin